

*G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!*

# Revsing

Næmingabókin, síða 46-59

Førleikar:

- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.
- At lesa samfelagsfakligar tekstir. At samanbera og meta um samfelagsfakligar tekstir.

Sorinskrivarin (Føroya rættur) hevur samandrátt yvir dómar á heimasíðuni.

- Farið inn á: Føroya rættur > Tíðindi > Samandráttur av dómum. Finna tit einki, ber til at skriva "Samandráttur av dómum" í leitifeltið.
- Hyggið eftir teimum 10 seinastu dómunum og setið teir upp eftir hvussu hørð revsingin var. Neyðugt er ikki at lesa allar dómarnar, einans niðasta brotið: "Thi kendes for ret".
- Hvat halda tit um revsingarnar? Eru tær nøktandi í mun til brotsverkið?

